# Skatta- og avgjaldsmál avgerðir

| Mál nr.: | Lóg: | Avgerð tikin: |
|---|---|---|
| 11/00234 | Lóg um Toll- og Skattafyrisiting § 24 | 24.11.2011 |

## Kærufreist. Frávik loyvt vegna ikki nøktandi grundgeving fyri avgerðini.


**Samandráttur:**

Kært er um avgerð hjá TAKS at krevja rentustuðul aftur. Kært er ov seint. Kærarin hevur ikki víst á viðurskifti, sum geva grundarlag fyri at loyva frávik frá kærufreistini. Tað er heldur ikki gjørligt at staðfesta, at avgerðin eyðsæð er skeiv materielt sæð. Hinvegin er grundgevingin hjá TAKS ikki nøktandi, og tí er heldur ikki gjørligt at meta um avgerðina. Mett verður tí, at grundarlag er fyri at loyva frávik frá kærufreistini, og kæran verður sostatt tikin til viðgerðar.


### Avgerð

**Kært er um** avgerð hjá TAKS at krevja rentustuðul aftur.

Avgerðin er frá 15. juli 2011, og má roknast at vera móttikin av kæraranum í seinasta lagi tann 18. juli 2011. Sambært § 24, stk. 2 í lóg um toll- og skattafyrisiting, skal kæra vera send, áðrenn 4 vikur eru lidnar frá tí, at kærandi fekk boð um avgerðina. Fýra vikur frá hesum degi er tann 15. august 2011. Kæran skal vera send, áðrenn hesin dagur er liðin fyri at vera rættstundis.

Kæran er innkomin 1. september 2011. Hon má roknast at vera send í seinasta lagi 29. august 2011. Hetta er sum útgangsstøði aftaná, at kærufreistin er farin.

### Kærarin

Tað framgongur av málinum, at TAKS hevur ásett eina freist til 1. september. Tað er tó ikki greitt, hvat hendan viðvíkur. Hartil framgongur, at kærarin hevur verið í Fugloy í summarferiuni, og at hann hevur ringt til Kærustovnin í tí tíðarskeiði, Kærustovnurin var stongdur vegna summarfrí.

### Avgerðin hjá Skatta- og avgjaldskærunevndini

Spurningurin er, um frávik skal gerast frá kærufreistini sambært § 24, stk. 3 í løgtingslóg nr. 169 frá 30. desember 1997 um toll- og skattafyrisiting.

Sambært § 24, stk. 2, síðsta pkt. í lóg um toll- og skattafyrisiting, skal kæra vera send, áðrenn 4 vikur eru lidnar frá tí, at kærandi fekk boð um avgerðina. Heimild er tó til at gera frávik frá kærufreistini, um nevndin heldur fullgóð forføll vera, jbr. § 24, stk. 3.

Kæran er ikki send rættstundis, jb. § 24, stk. 2 í fyrisitingarlógini, og útgangsstøðið er tí, at kæran ikki verður viðgjørd.

Sum nevnt kann frávik verða givið, um nevndin metir fullgóð forføll vera.

Kærarin hevur ikki víst á umstøður, sum greitt geva grundarlag fyri at loyva frávik frá kærufreistini.

Hinvegin kann sigast, at málið ikki er fult upplýst, og ymisk viðurskifti eru, sum kunnu hava týdning í mun til kærufreistina.

Í hesum sambandi kann vísast á freistina til 1. september, sum er ásett av TAKS. Tað er tó ikki greitt, hvat hendan viðvíkur.

Vísast kann tó eisini á, at avgerðin hjá TAKS er ógvuliga illa grundgivin. Grundgevingin hjá TAKS er, at kærarin sambært Landsfólkayvirlitinum ikki hevur búð í húsinum seinastu 5 árini. Rentustuðulin er afturkallaður aftur til 2007 við somu grundgeving, hóast lógarbroyting er í 2009. Tað er tí ivasamt, um grundarlag ikki var fyri at veita rentustuðulin áðrenn lógarbroytingina í 2009, og TAKS hevur ikki tikið støðu til, um grundarlag er fyri at krevja rentustuðulin aftur.

Tað er ikki gjørligt at staðfesta, at avgerðin eyðsæð er skeiv materielt sæð. Hinvegin er grundgevingin hjá TAKS ikki nøktandi, og tí er heldur ikki gjørligt at meta um avgerðina. Grundarlag er undir øllum umstøðum fyri eini heimvísing.

**Á hesum grundarlagi hevur Skatta- og avgjaldskærunevndin avgjørt at loyva frávik frá kærufreistini. Kæran verður sostatt tikin til viðgerðar.**